# ÁRSFRÁGREIÐING

## KRABBAMEINSFELAGIÐ 2022

krabbameinsfelagið

**Krabbameinsfelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
110 Tórshavn
Telefon: 31 79 59
Heimasíða: www.krabbamein.fo
T-postur: kmf@krabbamein.fo

**Starvsfólk**
Dagligur leiðari: Jansy Gaardlykke
Ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingur: Sólrun Jacobsen
Skrivstova: Poula Norðbúð

**Nevndin í Krabbameinsfelagnum**
Formaður: Durita Tausen
Næstformaður: Magnus Magnussen
Kassameistari: Anna Kristina Joensen
Nevndarlimur: Olga Kristina Hansen
Nevndarlimur: Marnar Fríheim Kristiansen

Tiltakslimur: Martin Joensen
Tiltakslimur: Elmar Ósá

**Hjálpargrunnurin**
Durita Tausen
Olga Kristina Hansen
Jónvør Christiansen

**Team Rynkeby Føroyar**
Elmar Ósá
Olga Kristina Hansen
Durita Tausen

# Innihald

Fororð ........ 1
Um Krabbameinsfelagið og virksemi ........ 2
Krabbamein er tann sjúkan, ið rakar flest fólk í Føroyum ........ 2
Nýggj krabbameinsætlan ........ 3
Krabbameinsráð ........ 3
Børn og sorg ........ 4
Tiltak um børn og sorg - hvussu vit hjálpa børnum, sum syrgja ........ 4
Undirvísingartilfar um børn og sorg ........ 5
**Hjálp, ráðgeving og vegleiðing** ........ 6
Familjusamrøður ........ 6
Samrøðubólkar ........ 6
Rørslutiltøk ........ 7
Tiltøk, sum tey sjálvbodnu skipa fyri ........ 7
Gransking ........ 11
Verkætlan um hvørjar ílegur kunnu geva bróstkrabba ........ 11
Marnar Fríðheim Kristiansen vart ph.d.-ritgerð um krabba í Føroyum ........ 11
Onnur tíðindi ........ 12
Spurnarkanning um at taka sól og sólvanar ........ 12
Blaðið Kvinna – stórt tema um bróskrabba ........ 13
Broytingar í dagpeningalógini ........ 14
Innsavning og stuðul ........ 14
Grannakaffi 2022 ........ 14
Spyr.fo ........ 15
Stuðulstiltak í SALT ........ 15
Team Rynkeby Føroyar Grunnurin ........ 15
Hjálpigrunnurin hjá Krabbameinsfelagnum ........ 16
Samskifti við almennar myndugleikar ........ 16
Fundir við Landssjúkrahúsið ........ 16
Fundir við Heilsumálaráðið ........ 17
Evropeiskt og norðurlendskt samstarv ........ 17
Hagtøl ........ 18
Støðan í Føroyum ........ 18
Samanbering við hini Norðurlondini ........ 18

# Fororð

2022. Árið, tá ið vit fingu nýggja krabbameinsætlan, tá ið stórir batar vórðu gjørdir í dagpeningalógini og vit fingu ein Phd-ara í krabbameini.

Eisini árið, har sjálvboðin hava skipað fyri nógvum hugnaløtum og øðrum tiltøkum og har út við 1000 fólk vóru til skeiðini um børn og sorg. Og ikki minst fingu nógv fólk hjálp og góða ráðgeving frá starvsfólkunum í Krabbameinsfelagnum.

**Krabbameinsætlanin**

Vit fegnast um at hava fingið nýggja krabbameinsætlan. Krabbameinsætlanin er eitt megnaravrik. Har eru 69 tilmæli um, hvat er neyðugt at gera. Tilmælini eru um fyribyrging, screening, betur samskipaða sjúklingagongd, endurmenning, palliatión og hvussu bøtt skal verða um hagtalsgrundarlagið.

Men orð einsamøll bera ikki á mál. Neyðugt er við avrikum og alneyðugt er at fara til verka.

Í Føroyum er krabbamein tann sjúkan, sum krevur flest mannalív. Tíbetur eru alsamt fleiri, sum fáa heilsubót. Tað vísa millum annað hagtølini fyri, hvussu nógv liva fimm ár eftir, at tey hava fingið staðfest krabbamein. Somu hagtøl vísa tíverri, at av Norðurlondum eru vit eftirbátar. Bæði tá ið talan er um kvinnur og um menn.

Besta trygdin fyri, at færri doyggja av krabbameini, er at færri fáa krabbamein. Størsta einstaka atvoldin til krabbamein er tubbak. Áheitanin frá Krabbameinsfelagnum á politiska myndugleikan er tí:

- Hækkið prísin á tubbaksvørum og avmarkið, hvør hevur loyvi at selja tubbak.
- Leggið størri dent á at skipa fyri átøkum, sum hava til endamáls at forða fyri, at børn og ung fara at roykja.

Eitt av tilmælunum í krabbameinsætlanini er, at eitt tvørfakligt krabbameinsráð verður sett undir Heilsumálaráðnum. Ráðið hevur m.a. uppgávuna at ráðgeva landsstýrisfólkinum, hvussu tilmælini í krabbameinsætlanini verða sett í verk. Krabbameinsráðið varð tilnevnt síðst í 2022 og landsstýriskvinnan hevur fingið fyrstu tilmælini.

At vit eru eftirbátar, tað má broytast. Og tað ber til at broyta.

**Vit fáa hjálpt, tí tit stuðla okkum**

Í Krabbameinsfelagnum eru nógv sjálvboðin, sum skipa fyri tiltøkum, hugnaløtum og rætta eina hjálpandi hond, tá ið felagið skipar fyri stórum tiltøkum.

Tað er næstan ikki ár, at ikki onkur vendir sær til felagið, tí tey vilja savna pening til felagið. Soleiðis var eisini í ár, tá ið m.a. stórt tiltak var í Salt í Suðuroy.

Øll hjálpin og allur stuðulin vit fáa, tey gera, at vit kunnu veita ta hjálpina, sum vit gera. Tað er alt grundarlagið undir arbeiðinum hjá okkum. Og brúk er fyri okkum. Nógv fólk venda sær til Krabbameinsfelagið fyri at fáa hjálp, ráð og vegleiðing, og talið er økt nógv seinastu árini.

Vit takka hjartaliga fyri allan stuðulin.

Jú. 2022 hevur verið eitt gott ár.

**Durita Tausen, formaður**

## Um Krabbameinsfelagið og virksemi

Krabbameinsfelagið er ein óheftur felagsskapur, ið virkar fyri at bøta um korini hjá fólki við krabbameini og avvarðandi teirra. Vit veita stuðul til gransking og upplýsa um fyribyrging av krabbameini. Harafturat ávirka vit avvarðandi myndugleikar at bøta um umstøðurnar hjá teimum, sum eru sjúk, umframt at vit arbeiða fyri, at færri fáa krabbamein, at fleiri verða frísk ella liva so væl sum til ber við sjúkuni.

Framtíðarvónin hjá Krabbameinsfelagnum er, at krabbameinsgátan verður loyst. Tíverri er málið ikki rokkið, og tí hava vit eina stóra og avbjóðandi uppgávu fyri framman.

Kjarnuuppgávan hjá Krabbameinsfelagnum er støðugt at hjálpa og bøta um umstøðurnar hjá teimum, sum hava krabbamein, familjuni og teimum, sum eru rundan um. Óansæð, um krabbameinssjúka nýliga er staðfest, undir og eftir sjúku, so veita vit kunning, hjálpa og stuðla á hvørjum stigi á leiðini. Eisini teimum, sum hava mist. Vit bjóða eina røð av tilboðum og tænastum, sum kunnu vera við til at hjálpa tí sjúka og teimum avvarðandi fram á leið og í støðuni, sum tey eru í.

Hjá Krabbameinsfelagnum starvast til dagligt trý starvsfólk. Eitt skrivstovufólk og tveir sjúkrarøktarfrøðingar við drúgvum royndum innan krabbameinsøkið. Tey skipa fyri tiltøkum, hava samrøðubólkar og samrøður við tey, ið eru ella hava verið sjúk og tey, sum varða av. Starvsfólkini svara spurningum, geva vón og vegleiða øllum teimum mongu, ið dagliga seta seg í samband við felagið. Eingin skal standa einsamallur, og tí verður hetta raðfest høgt.

Vitjað verður á sjúkrahúsum, stovnum, í skúlum og fyritøkum fyri at veita hjálp og ráðgeving, umframt at kunna um Krabbameinsfelagið og tað, sum felagið hevur at bjóða.

Á heimasíðuni krabbamein.fo, á Facebook og Instagram verður kunnað um øll tiltøk og tilboð, sum eru á skrá og sum felagið veitir, umframt at vit senda kunning út til viðkomandi støð.

Krabbameinsfelagið er størsta einstaka sjúklingafelag í Føroyum. Virksemið hjá felagnum er fíggjað við limagjøldum og gávum. Uttan henda stuðulin bar ikki til at reka felagið. Í 44 ár hevur tað borið til hjá felagnum at hjálpt, takkað verið tí stuðli, ið felagið hevur fingið øll hesi árini.

**Krabbamein er tann sjúkan, ið rakar flest fólk í Føroyum**

Einir 250 føroyingar um árið fáa staðfest krabbamein og talið veksur. Tað vil siga, at hvørja viku fáa umleið fimm føroyingar boðini: ‘tú hevur krabbamein’. Nógv eru vorðin frísk og nógv hava mist. Tað munnu vera fá í Føroyum, sum ikki hava kent sviðan av krabbameini.

Í Føroyum er krabbamein tann sjúkan, sum krevur flest mannalív. Tíbetur eru fleiri og fleiri sum fáa heilsubót. Tað vísa millum annað hagtølini fyri, hvussu nógv liva fimm ár eftir, at tey hava fingið staðfest krabbamein. Somu hagtøl vísa tíverri, at av Norðurlondum liggja vit aftast.



## Nýggj krabbameinsætlan

Hvussu bøta vit um støðuna? Fyrsta stigið er at seta mál, serliga at seta politisk mál. Og so skapa fyritreytir fyri at røkka málunum.

Tí gleðast vit um, at nýggj krabbameinsætlan varð handað Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismanni í heilsumálum, tann 8. apríl 2022.

Í Krabbameinsætlanini, sum Krabbameinsfelagið saman við fleiri hevur verið til at gjørt, eru 69 tilmæli um, hvat er neyðugt at gera. Tilmælini eru um fyribyrging, screening, betur samskipaða sjúklingagongd, endurmenning, palliatión og hvussu bøtt skal verða um hagtalsgrundarlagið. Tað er týðandi, at tilmælini verða sett í verk, fyri at røkka málunum og sostatt bøta um verandi støðu.



Krabbameinsætlanin er eitt megnar avrik og rúgvismikið verk. Nógv arbeiðsorka er løgd í, og tilsamans hava fleiri enn 40 fólk verið við í arbeiðinum – í stýrsbólki, verkætlanarbólki, tilvísíngarbólki og sum ráðgevar.

So hvørt sum hesi 69 tilmælini fara at verða sett í verk, gevur tað okkum vón um betri fyribyrging, betur samskipaða sjúkugongd, endurmenning, palliatión og betri hagtalsgrundarlag.

Krabbameinsætlanin kann lesast **her**.

### Krabbameinsætlanin við í samgonguskjalinum

Tá ið samráðingar vóru um nýggja samgongu fyri jól, heitti Krabbameinsfelagið á forfólkini í politisku flokkunum at fáa við í samgonguskjalið, hvussu tilmælini í nýggju krabbameinsætlanini skuldu verða sett í verk.



Tí gleðast vit í Krabbameinsfelagnum um, at samgongan er samd um, at átøk í krabbameinsætlanini skulu fremjast. Og at tað eisini er nevnt, at bíðitíðin til útgreining skal verða stytt. Eins og bíðilistarnir í heilsuverkinum yvirhøvur.

Vit ynskja samgonguni, og ikki minst Margit Stórá, landsstýriskvinnu í heilsumálum, blíðan byr og hegni í arbeiðinum at røkka tí, sum samgonguskjalið gevur lyfti um.

## Krabbameinsráð

Krabbameinsráðið varð tilnevnt beint fyri løgtingsvalið í 2022. Ráðið er mannað við fólki, ið vara av krabbameinsøkinum í Føroyum. Krabbameinsfelagið hevur eitt umboð í ráðnum.

Krabbameinsráðið er eitt ráð undir Heilsumálaráðnum. Endamálið hjá ráðnum er at ráðgeva og vegleiða politiska myndugleikanum og heilsumyndugleikanum í Føroyum. Fyrsta uppgávan verður at ráðgeva, hvussu tilmælini í krabbameinsætlanini verða sett í verk.

Harumframt fer Krabbameinsráðið at umrøða og fylgja við í aktuellum og týdningarmiklum evnum innan økið. Við sínari ráðgeving og vegleiðing til landsstýriskvinnuna í heilsumálum, skal ráðið vera við til at stuðla undir eina góða og hóskandi framgongd á krabbameinsøkinum til gagns fyri sjúklingar og avvarðandi.



## Børn og sorg

### Tiltak um børn og sorg  - hvussu vit hjálpa børnum, sum syrgja

Í døgunum 26. – 29. september í 2022 skipaði Krabbameinsfelagið saman við Undirvísingarstýrinum fyri trimum skeiðum og einum almennum fyrilestri um "børn og sorg – hvussu vit hjálpa børnum, sum syrgja".

Tiltakið var liður í áhaldandi arbeiðinum hjá Krabbameinsfelagnum at varpa ljós á børn og sorg og tilbúgving.

Hvørt ár uppliva fleiri børn, at foreldur, systkin ella onnur av teirra nærmastu gerast álvarsliga sjúk ella doyggja. Tá ið álvarslig sjúka ella deyði raka, kemur nógvur ótti og ótryggleiki inn í lívið hjá teim avvarðandi, ikki minst hjá børnunum.

Tá ið landsinnsavningin 'Føroyar móti krabba' var í 2021, varð gjørt av, at ein partur av peninginum skuldi verða brúktur til sorgartilbúgving at hjálpa børnum, sum syrgja. Krabbameinsfelagið hevur fyrr, saman við Mentamálaráðnum, skipað fyri skeiðum í sorgartilbúgving. Fyrstu ferð var í 1998, aðru ferð í 2000 og triðju ferð í 2005.

Endamálið við skeiðunum var at styrkja førleikarnar hjá starvsfólkunum at fáa eyga á sorgarmynstur og atburð hjá børnum, ið eru rakt av sorg, soleiðis at tey kunnu traðka til og veita hjálp beinanvegin. Hetta er ein liður í einari tilgongd, har miðað verður eftir, at allir skúlar, barnagarðar og stovnar, ið varða av børnum, hava eina sorgartilbúgving. Sorgartilbúgvingin skal hava greiða ætlan og neyvar leiðreglur fyri, hvussu borið skal verða at í kreppustøðum sum hesum, tá ið børn verða rakt av sorg. Fleiri skúlar og barnagarðar í Føroyum hava slíkar ætlanir, men málið er, at øll skulu hava eina tilbúgving, ið er lagað til tørvin hjá hvørjum einstøkum stovni.

Soleiðis, sum vit hava innrættað samfelagið í dag, eiga vit eisini at hugsa um at inndraga tey vaksnu, sum frá mánadag til fríggjadag eru um barnið í dagtímunum - ofta í nógv størri mun enn foreldrini sjálvi. T.v.s. námsfrøðingar, hjálparfólk, lærarar, heilsustarvsfólk, sálarfrøðingar, sosialráðgevar, prestar og starvsfólk í frítíðartilboðum. Umframt onnur avvarðandi sum eru um barnið. Øll hesi kunnu hava ein týðandi leiklut í at tryggja, at barnið kemur trygt ígjøgnum barnaárini hóast sorg, sakn og pínu.

Fyrilestrarhaldari var Per Bøge, barna- og ungdómsleiðari hjá Kræftens Bekæmpelse í Danmark. Eisini Otto Gram, varaskúlastjóri í Tvøroyrar skúla og Mirjam Johannesen, leiðari fyri dagstovnin Sólareygað hjá Tórshavnar Kommunu, søgdu frá, hvussu tey hava arbeitt við sorgartilbúgving á teirra stovni. Børnini sluppu eisini til orðanna.



Nærum 1000 fólk vóru á skeiðunum og afturmeldingarnar hava verið framúr góðar.

Eitt av skeiðunum, tað sum var í Norðurlandahúsinum týsdagin 27. september, varð tikið upp og bandað. Tilfarið liggur tøkt á heimasíðuni hjá Krabbameinsfelagnum, soleiðis at skúlar, stovnar og onnur kunnu brúka tað og fáa gagn av tí.

**Fyrilestrarnir síggjast her.**

**Børnini sluppu eisini til orðanna í filmum, sum Krabbameinsfelagið hevði gjørt til høvið**

Talan er um tríggjar filmar, har børn siga frá um sínar upplivingar við sjúku og deyða, og um hvørja hjálp tey fingu. Tey koma við ráðum um, hvat var gott og hvat kundi verið gjørt betur.

**Filmarnir við børnunum síggjast her.**

## Credo. Sending í Kringvarpi Føroya um Børn og sorg

Í samband við tiltakið um børn og sorg, hevði Kringvarp Føroya samrøðu við Per Bøge, ið hevur starvast hjá Kræftens Bekæmpelse í Danmark í yvir tríati ár. Hann er stjóri fyri økinum "børn og ung" og var fyrilestrahaldari til tiløkini um børn og sorg.

Hann var gestur í sendingini Credo.

**Hoyr sendingina her.**

## Undirvísingartilfar um børn og sorg

Undirvísingarstýrið, Berin og Krabbameinsfelagið samstarva við Kræftens Bekæmpelse í Danmark um eina felags verkætlan at týða undirvísingartilfar hjá Kræftens Bekæmpelse til føroyskt. Undirvísingartilfarið er um børn og sorg  og eitur á donskum: “Lær om sorg”.

Talan er um undirvísingartilfar til 3., 4., 5. og 6. flokk. Kræftens Bekæmpelse er harumframt ávegis við at menna tilfar til 0.- 2. flokk og til framhaldsdeildina, sum eisini fer at verða týtt til føroyskt.

Tað snýr seg um teldutøkt skrivligt tilfar, umframt stuttfilmar. Sí leinki **Forside - Læromsorg (cancer.dk)**

Út frá samskifti, sum vit hava havt við lærarar og heilsufrøðingar í fólkaskúlanum, vita vit, at hetta er sera hent undirvísingartilfar, og at tað verður brúkt í fólkaskúlanum, t.d. tá ið børn missa foreldur ella systkin. Eisini hava hesir fakbólkar víst á, at ynskiligt er, at tilfarið verður týtt til føroyskt, og tí eru vit farin undir hetta arbeiðið.

## Hjálp, ráðgeving og vegleiðing

Nógv fólk venda sær til Krabbameinsfelagið fyri at fáa hjálp, ráð og vegleiðing og er talið økt nógv seinastu árini.

Krabbamein ber ofta við sær broytingar, eisini í familjuni, og kann tað raka sera meint. Nógvar nýggjar og óvanligar støður kunnu taka seg upp, og tað kunnu vera nógvir tankar og nógvar kenslur at stríðast við. Bæði tey, ið eru ella hava verið sjúk, tey ið hava mist og tey avvarðandi kunnu kenna seg máttleys og einsamøll, eins og tørvurin á hjálp kann vera stórur.

Trý starvsfólk starvast á ráðgevingarstovuni hjá felagnum. Eitt skrivstovufólk og tveir ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingar við drúgvum royndum innan krabbameinsøkið.

Uppgávurnar eru m.a. at

- veita hjálp, ráð og vegleiða
- bjóða samrøður – á ráðgevingarstovuni, heima hjá fólki, á sjúkrahúsi og eisini í telefon
- bjóða samrøður við pør, familju og onnur avvarðandi
- hava samrøðubólkar
- hava tætt og gott samband við bæði sjúkrahús, Heimatænastuna, Hvíldarheimið og aðrar stovnar í Føroyum og uttan fyri Føroyar
- undirvísa, hava framløgur og fyrilestrar
- skipa fyri og samskipa onnur tiltøk og tilboð, sum felagið hevur at bjóða.

### Familjusamrøður

Familjusjónarhornið hevur stóran týdning í ráðgevandi arbeiðinum hjá felagnum. Tá ið ein í familjuni fær krabbamein ella doyr, rakar tað alla familjuna, eisini børnini. Endamálið við familjusamrøðunum er at geva familjuni høvi at savnast um tað, sum fyllir og er tungt at bera einsamøll ella einsamallur.

Eru foreldur ella systkin sjúk ella doyggja, kunnu børn og ung vera undir øktum sálarligum og sosialum trýsti. Tey kunnu fáa sálarligar trupulleikar at dragast við, so sum ótta og stúran. Tað kann vera sorgin yvir at missa og óttin fyri framtíðini, um tann sjúki fer at doyggja ella at sjúkan versnar.

Tí kann tað vera gott at koma til eina familjusamrøðu. Tá er tíðin sett av til at hugsavna seg um at práta um tað, sum fyllir hjá hvørjum einstøkum. Tað er gott at kunna seta orð á tankar og kenslur yvir fyri hvør øðrum og at hoyra hvønn annan. Tað er jú so ymiskt, hvat fyllir hjá hvørjum einstøkum.

Fleiri familjur hava tikið av møguleikanum at koma til familjusamrøðu, og okkara royndir eru, at fólk eru glað um at fáa henda møguleika. Tað ger tey betur før fyri at standa saman og handfara torføru støðuna, tey eru í. Tað er ein góð hjálp fyri tann einstaka og fyri alla familjuna.

### Samrøðubólkar

Skipað hevur verið fyri fleiri samrøðubólkum í farna ári, bæði fyri tey, ið eru ella hava verið sjúk og fyri tey, sum hava mist. Í samrøðubólkum, sum ráðgevar hjá felagnum standa fyri, hittast fólk, sum eru í somu støðu. Har fæst hjálp, íblástur og stuðul til at finna veg í eini svárari tíð.



Í samrøðubólkunum leggja vit áherðslu á, at tey sum eru í bólkinum kenna seg trygg, at tey fáa umsorgan og at alt er í trúnaði.

Royndirnar hjá okkum eru, at fólk eru sera glað at hitta og tosa við onnur í somu støðu. Hetta kann vera gott og gevandi, og er ofta tað fyrsta fetið, fram ímóti at finna fótafestið aftur.

### Rørslutiltøk

Krabbameinsfelagið hevur rørslutiltøk ymsa staðni í landinum:

Í VÁGUM | Í KLAKSVÍK | Í SUÐUROY | Í TÓRSHAVN

Rørslutiltøkini eru eina ferð um vikuna og fyri øll, sum hava ella hava havt krabbamein. Tey avvarðandi eru eisini vælkomin. Dentur verður lagdur á venjingar, sum geva styrki og kondition.

Ítróttur og rørsla betra um útlitini fyri at fáa heilsuna aftur, samstundis sum tað gevur styrki, bæði likamliga og sálarliga, at standa ímóti hørðu viðgerðini. Samanhaldið millum íðkararnar er sera gott og hava tey stóra gleði av at hittast hvørja viku.

Tó hava venjingarnar verið darvaðar av koronu og tí verið nakað óstøðugar í 2022.

### Sjúkrarøktarfrøðilesandi í starvsvenjing

Seinastu nógvu árini hava sjúkrarøktarfrøðilesandi av Sjúkrarøktarfrøðideildini á Fróðskaparsetri Føroya verið í starvsvenjing í Krabbameinsfelagnum. Vit eru fegin um at hava lesandi. Hetta ger, at tey fáa innlit í arbeiðið í Krabbameinsfelagnum og innan krabbameinsøkið. Harafturat gevur tað okkum nýggjan íblástur, er mennandi og gevandi fyri felagið. Lesandi vóru í Krabbameinsfelagnum í viku 39 og 40. Tær hava verið við til samrøðubólk fyri fólk, sum hava mist makan og verið til rørslutiltøkini, umframt onnur tiltøk. Tær hava eisini verið til staðar, meðan starvsfólkini hava havt samrøður umvegis telefon. Tær lesandi vóru sera glaðar fyri at vera í starvsvenjing hjá Krabbameinsfelagnum.

## Tiltøk, sum tey sjálvbodnu skipa fyri

Nógv sjálvboðin eru knýtt at felagnum og gera eitt megnararbeiði fyri Krabbameinsfelagið. Nógv av teimum eru fólk, ið sjálvi hava havt krabbamein. Hetta eru eldsálir, ið skipa fyri ymiskum tiltøkum, hjálpa uppá nógvar ymiskar mátar og eru ein av grundarsteinunum undir felagnum. Teirra arbeiði ger stóran mun, og uttan tey sjálvbodnu hevði ikki borið til hjá felagnum at rokkið so víða, sum vit gera.

Fleiri av teimum sjálvbodnu eru virkin í bólkum, sum eru serliga ætlaðir fólki, sum hava ella hava havt ávísa sjúku ella sum varða av.

Vit hava bólkar fyri fólk, sum hava ella hava havt

- bróstkrabba
- undirlívskrabba
- móðurmerkjakrabba
- prostatakrabba
- lip-og lympfødem.

Eisini eru bólkar fyri

- makar hjá monnum við prostatakrabba
- foreldur at børnum við krabbameini.

Tey sjálvbodnu skipa eisini fyri ymiskum tiltøkum so sum hugnaløtum, fyrilestrum, útferðum, gongutúrum og innsavning. Tiltøkini, sum vóru í 2022, vóru væl vitjað.




**7. februar, 10. mai og 10. september** – Sminkuskeið

Vit skipaðu saman við Body Shop fyri sminkuskeiði, undirvísing og hugnaløtum fyri kvinnum, sum eru í viðgerð fyri krabbamein.

Starvsfólk frá Body Shop undirvístu í húðrøkt og makeup. Hjá summum kann húðin broytast og gerast sartari. Tískil er gott at vita, hvussu húðin skal røktast. Makeup kann gera, at gerandisdagurin kennist lættari og at ein kennir seg frískari.

**6. mars** var altjóða lymfødemdagur. Í tí sambandi varpaði Lip– og Lymfødembólkurin á Facebook á sjúkurnar lip– og lymfødem.

Tíverri vita nógv, sum hava við hesar sjúklingar at gera, ikki nóg nógv um hesar sjúkur og hvør besta hjálpin er. Í løtuni er bara ein fysioterapeutur í Føroyum, sum kann geva viðgerð til hesar sjúklingar. Tað er alt ov lítið til at nøkta tørvin. Tí vóna vit og arbeiða fyri, at tað verður meira fokus sett á hetta økið.

**8. mars –** Hugnakvøld fyri fólk, ið hava lip– og lymfødem.

Anne Lisa Davidsen og Armgarð Hammer greiddu frá og vístu myndir og tilfar frá lymfødemráðstevnuni, tær vóru á í november í 2021, umframt at tær upplýstu um tey nýggjastu vørurnar innan økið.

**26. apríl –** Hugnakvøld fyri kvinnur, sum hava ella hava havt undirlívskrabba

Gunnvá A. Hansen, ið hevði krabbamein í 2007 greiddi frá, tá ið hon fekk staðfest krabbamein, hvussu hon fótaði sær og hvussu hon hevur tað í dag.



**27. apríl –** Tiltak fyri menn við prostatakrabba

Á skránni var framløga við Harriet M. Gordonsdóttir og Lív Skoubou, sjúkrarøktarfrøðingum, ið starvast í urologiini á B3 á Landssjúkrahúsinum. Tær greiddu frá sínum arbeiði við prostatakrabba, og um hvussu ein kann fáa hjálp og brúka urologiska ambulatoriið. Høvi var eisini at seta spurningar.

**28. apríl** – Hugnakvøld fyri kvinnur, sum hava ella hava havt bróstkrabba

Petra Thomsen, ið hevði krabbamein í 2018, og Andrea Lygia Popescu, ið hevði krabbamein í 2019, tosaðu um, hvussu tað var at fáa staðfest bróstkrabba, hvussu tær fótaðu sær aftur og hvussu tær hava tað í dag.

**11. mai** – Gongutúrur út á Trælanípuna fyri fólki, sum hava ella hava havt krabbamein

Gingið var eftir gøtuni frá Nípukafe´ini í Miðvági út á Trælanípuna. Aftaná túrin bjóðaði Krabbameinsfelagið suppu og drekkamunn á Nípukafe'ini.

**19. juni** – Familjudagur í Sarpugerði í Norðragøtu fyri familjum, sum hava ella hava havt børn við krabbameini.



Tað var nevndin í Foreldrabólkinum at børnum við krabbameini, sum saman við Krabbameinsfelagnum legði dagin til rættis. Dagurin byrjaði við einum góðum bita í felagshúsinum í Sarpugerði. Veðrið var av tí allar fagrasta og nógv ymisk virksemi og spøl vóru á vøllinum fyri bæði stór og smá. Eisini kom klovnurin BUBU á vitjan, og tað var einki minni enn fantastiskt. Dagurin endaði við, at øll fóru at bovla og eta ein betri bita í Bóvlinghøllini í Leirvík.

Millum 40 og 50 fólk vóru til tiltakið, bæði børn og vaksin. Ein sera væleydnaður dagur við góðum upplivingum og minnum fyri lívið.

Team Rynkeby grunnurin stuðlaði tiltakinum og eru vit sera takksom fyri tað.

**16. – 18. september** vóru umboð fyri Bót til bata, bróstkrabbabólkin hjá Krabbameinsfelagnum, á norðurlendskari bróstkrabbaráðstevnu í Helsinki. Ráðstevnan verður vanliga hildin annaðhvørt ár, men orsakað av koronu hevur ein steðgur verið síðani í 2018, tá ið ráðstevnan varð hildin í Føroyum.

Skráin var fjølbroytt; m.a. vóru fyrilestrar um bróstkrabba, skurðviðgerðir, lymfødem og arbeiðið sum sjálvboðin, umframt framløgur frá øllum Norðurlondunum. Føroyska framløgan legði dent á, hvussu øðrvísi treytir føroyskir bróstkrabbasjúklingar hava, borið saman við sjúklingar í hinum Norðurlondunum, tá ið talan er um t.d. stráluviðgerð. Føroyskir sjúklingar mugu sum teir einasta fara av landinum at fáa viðgerðina.

Ein góð ráðstevna, við íblástri til framhaldandi virksemi og har nógv nýggj vinabond vórðu knýtt.

**22. september** – Í oktober varpaði Bót til Bata ljós á bróstkrabba. Í hesum sambandi bar til at ogna sær oyrnalokkar og armbond og samstundis stuðla gransking og arbeiðinum hjá Bót til Bata. Bróstkrabbi er íðuligasta krabbameinssjúka hjá kvinnum og rakar eina av hvørjum tíggju kvinnum í Føroyum. Bróstkrabbi rakar eisini menn, og ein av hvørjum túsund monnum fær sjúkuna.

Fleiri ferðir áður hevur felagið varpað ljós á bróstkrabba í samstarvi við føroyskan sniðgeva, ið hevur sniðgivið ein bróstkrabbalut.

Í 2022 varð samstarvað við STEINUM, sum hevði sniðgivið vakrar oyrnalokkar og armbond. Armbond og oyrnalokkar hava kvinnur í Ukraina gjørt, sum vanliga framleiða fyri STEINUM.

Sølan gekk ógvuliga væl og alt varð selt eftir bara fáum tímum.



**12. oktober** varð skipað fyri hugnaløtu á bókasavninum við Løkin í Runavík fyri kvinnum, sum hava ella hava havt bróstkrabba. Á skránni var hugni og prát, har Annika Karlsdóttir Ljósstein segði frá, tá ið hon fekk staðfest bróstkrabba, sum 36 ára gomul.

**17. oktober** – Hugnaløta fyri fólk við lip– og lymfødem

Høgni Sloan Justesen hevði eitt upplegg um hvørja ávirkan kostur og rørsla kunnu hava á lip- og lymfødem.

Høvi var at seta spurningar og koma við hugskotum til nevndina um hvat er týðandi at arbeiða við.

**24. oktober** – Hugnakvøld fyri kvinnur við undirlívskrabba, har hugni og prát var á skránni, umframt at kvinnurnar høvdu høvi at hitta aðrar kvinnur í somu støðu.

**23. november** – Fyrilestur fyri menn við prostatakrabba, um tá ið prostatakrabbi ávirkar kynslívið

Fyrilestrahaldarar vóru Birgitte Schantz Laursen og Anette Højer Mikkelsen, kliniskir sexologar frá Aalborg sjúkrahúsi.

Heitið á fyrilestrinum var "Sexologisk ráðgeving, tá ið kynslívið verður ávirkað av sjúku og viðgerð fyri prostatakrabba, um likamligar og sálarligar trupulleikar, sum standast av viðgerðini, og um, hvørjir møguleikar eru at fáa hjálp". Eisini komu tær inn á evni sum inkontinens (ringt við at halda uppá vatnið), venjingar av kokubotni og hjálpitól.

## Gransking

### Verkætlan um hvørjar ílegur kunnu geva bróstkrabba



Tann 4. januar hevði Noomi O. Gregersen, ið er PhD í mýlavísindum og er verkætlanarleiðari í FarGen og í HBOC-verkætlanini, framløgu í Kringvarpinum um hvørjar ílegur kunnu geva bróstkrabba.

Krabbameinsfelagið hevur stuðlað verkætlanini, sum m.a. hevur til endamáls at eyðmerkja ílegur, sum kunnu vera orsøk til arvaligan bróstkrabba í Føroyum. Verkætlanin er skipað soleiðis, at ílegudátur hjá einum sjúkubólki eru samanbornar við dáturnar hjá einum bólki av frískum kvinnum, sum eru partur av FarGen-verkætlanini. Nakrar av fyribilsniðurstøðunum frá kanningunum eru:

- At BRCA1- og BRCA2-fráfrigdi eru at finna hjá føroyskum kvinnum, men talan er ikki um sjúkuelvandi frábrigdi
- At onnur ílegufrábrigdi enn BRCA1 og BRCA2 eisini kunnu elva til bróstkrabba
- Til ber ikki at ávísa eitt ítøkiligt samband millum ávís ílegufrábrigdi og bróstkrabba, men hugt eigur at vera gjøllari at ávísum ílegum
- Neyðugt er at kanna fleiri fólk, sum hava ella hava havt bróstkrabba, áðrenn eitt ílegu-panel kann gerast, sum kannar ávís ílegufrábrigdi, sum finnast hjá føroyingum. Hetta merkir at ílegukanningin gerst meira málrættað til føroyskar sjúklingar, og kann fáa stóran týdning fyri, hvussu vit veita arvafrøðiliga ráðgeving í Føroyum.

Verkætlanin byrjaði í 2018 og úrslitini verða skjótt útgivin sum grein í vísindaligum tíðarriti. Næsta stig í verkætlanini verður at gera RNA lesing til forsøgn av krabbameinsviðgerð við grundað á krabbavevnað.

### Marnar Fríðheim Kristiansen vart ph.d.-ritgerð um krabba í Føroyum

Í september vardi Marnar Fríheim Kristiansen, lækni ph.d.-ritgerð sína um krabba í Føroyum, ítøkiliga um títtleika, deyðatal og yvirlivilsi. Ein verkætlan, sum m.a. Krabbameinsfelagið og grunnurin fyri Team Rynkeby Føroyar hava stuðlað.

Marnar greiddi frá grundarlagnum undir granskingini og um tølini fyri krabbameinstilburðir í Føroyum. Hann hevur gjøgnumgingið og eftirkannað krabbameinsskránna, sum varð stovnsett í 1994, men gongur aftur til 1960. Fleiri tilburðir afturat eru nú skrásettir og mannagongdir eru gjørdar fyri skráseting frameftir. Tilfarið er síðani samanborið við norðurlendsku tølini í NORDCAN skránni.

Marnar hevur skrivað fýra greinar sum part av ph.d.-verkætlanini:

1. Um títtleika og deyðatal
2. Yvirlivilsi
3. Krabba hjá børnum
4. Covid-19 og krabba.

Hann umrøddi munir á tilburðum í Føroyum og aðrastaðni, møguligar orsøkir og at enda tørvin á at skipa økið í framtíðini.

Tað hevur verið bæði spennandi og áhugavert at fylgt við í arbeiðinum og hevur hann lagt lunnar undir framtíðarskráseting av krabbameinstilburðum í Føroyum, og um hvussu vit fáa betri hagtalsgrundarlag í Føroyum.




Í nýggju krabbameinsætlanini, sum varð handað fyrst í apríl í 2022, eru millum tilmælini fýra, um hvussu vit fáa betri hagtalsgrundarlag í Føroyum. Granskingin hjá Marnari at takka, eru góð hagtøl í krabbameinsætlanini og fýra greið tilmæli eru orðað um hetta økið. Vit í Krabbameinsfelagnum fara at leggja doyðin á áhaldandi at minna á tilmælini – at fáa tey framd, so vit hava góð og álítandi krabbameinshagtøl.

## Onnur tíðindi

### Spurnarkanning um at taka sól og sólvanar

Spyr.fo hevur gjørt spurnarkanning fyri Krabbameinsfelagið um vanar og hugburð at taka solarium sól.




Krabbameinsfelagið hevur latið kanning gera um vanar og hugburð hjá føroyingum til at taka sól. Spyr.fo stóð fyri kanningini, sum varð gjørd hin 9. januar í 2022. Spurd vórðu 500 fólk eldri enn 18 ár.

Týdningarmestu orsakirnar til húð- og móðurmerkjakrabbamein eru ov nógv sól og sólskáldingar, serliga í barndómi og ungdóminum. Eisini er greitt, at sjálvt avmarkað nýtsla av solarium kann vera vandamikil. Sól og solarium eru orsøkir til móðurmerkjakrabba, tí uv-strálurnar kunnu skaða kyknurnar í húðini.

Av teimum, sum svaraðu kanningini hjá Spyr.fo, vóru 18%, sum høvdu børn millum 14 og 18 ár. Tey vórðu spurd, um børnini høvdu tikið sól. 24% svaraðu, at børnini høvdu roynt tað einstakar ferðir, og 7% at børnini taka regluliga sól. Her er talan um smá tøl, sum tí skulu takast við serligum fyrivarni. Hóast tølini eru smá, gevur hetta okkum eina ábending um, at tað framvegis eru ung undir 18 ár, sum taka sól. Tískil kann man siga, at lógin um 18 ára aldursmark ikki verður fylgd nóg væl. Hetta halda vit er stórt spell. Tí mæla vit til, at lógin verður broytt til eisini at fata um privatar sólstøðir, og at tær verða mannaðar.

Í kanningini hjá Spyr.fo sæst eisini, at 84% av føroyingum taka undir við 18 ára aldursmarki fyri at taka sól. Í mai í 2015 varð ásett við lóg, at tað ikki er loyvt at selja solarium til persónar yngri enn 18 ár. Fevnd av lógini eru kommunalir stovnar, landsstovnar og líknandi. Lógin tekur ikki støðu til ómannaðar sólstøðir. Tað vil siga, at einki forðar ungfólki undir 18 ár at leggja seg undir solarium á ómannaðum sólstøðum.

Í kanningini varð eisini spurt, um svargevarnir høvdu varnast skelti, sum upplýsa um vandan við at taka sól. Her svaraðu 71%, at tað høvdu tey ikki varnast. Sigast skal, at privatir útbjóðarar ikki eru fevndir av solariumlógini, og tí ikki hava skyldu at upplýsa um hetta, men Krabbameinsfelagið metir, at tað kortini hevði klætt teimum at upplýst um vandan, serliga tá ið hugsað verður um børn og ungfólk.

Krabbameinsfelagið metir, at kanningin hjá Spyr.fo er greið ábending um, at tað eisini framyvir eigur at verða kunnað um týdningin av skilagóðum sólvanum og at sløkkja solarium. Børn og ung kunnu hava ilt við at síggja fyri sær langtíðar árinið av at taka sól. Tí ætlar Krabbameinsfelagið eisini at halda fram at virka fyri 18 ára aldursmarki fyri at taka sól. Solariumlógin frá mai í 2015 var eitt fet rætta vegin, men vit meta ikki, at hon nóg væl avmarkar, at børn og ung taka sól, eftirsum lógin bara fevnir um landsstovnar og kommunalar stovnar og ikki tekur støðu til ómannað solarium. Sambært kanningini er líkt til, at mong taka undir við okkum."

Kanningin kann lesast her:

**Sól-kanning aldur**

**Sól-kanning kyn**

**Sól-kanning øll**

## ENN KVINNA – filmur við kvinnum, sum hava havt krabbamein

Tað er Lake Film, ið hevur gjørt filmin, ið Krabbameinsfelagið og Body-Shop hava stuðlað.

At fáa staðfest krabbamein er ofta ein ógvuslig uppliving. Tað er, sum um teppið verður rivið undan einum, og lívsgleðin og lívsvónin kunnu verða hótt. Sjúkan og viðgerðin kunnu fara illa við kroppi og sál, og tað kann taka langa tíð at fóta tær aftur.

Samleikin og sjálvsfatanin kunnu eisini verða ávirkað. Nógv hjáárin standast av viðgerðini og tað er ikki óvanligt at vera móð og troytt, umframt at missa hár, brýr og eygnavippur. Húðin gerst bleik, litleys og útsjóndin broytist. Hetta kann vera við til at ávirkað lívsgóðskuna.

Filmurin snýr seg um, hvussu gott tað er at fáa hjálp, ráð og vegleiðing, bæði kropsliga, sálarliga og sosialt. Eisini kunning og undirvísing um, hvussu kvinnur kunnu røkta húðina og leggja make-up. Læra at tekna eygnabrýr og leggja farvur, so man sært frískari út. At gera nakað gott fyri seg sjálva, taka ímóti hjálp og teimum tilboðum sum finnast, kann vera við til at lyfta ein upp, og økja um vælveru og lívsgóðsku.

**Filmurin kann síggjast her**

## Blaðið Kvinna – stórt tema um bróskrabba

Stórt tema var um bróstkrabba í heystblaðnum – sjúkan, sum rakar tíggjundu hvørja kvinnu, siga hagtølini.

Í ár høvdu tey á Kvinnu tríggjar djarvar, inspirerandi kvinnur, sum á hvør sín hátt søgdu sína søgu um, hvussu tað kendist, tá ið tær fingu bróstkrabba, og hvussu sjúkugongdin og bardagin móti krabbanum fyltu áður sorgleysa gerandisdagin. Søgurnar vóru ymiskar, eymar og ómetaliga sterkar – júst sum tær tríggjar.

Ein patur av lýsingainntøkuni av blaðnum fór til Krabbameinsfelagið. Tilsamans 50.000 krónur. Tað gleðast vit um.

Í blaðnum var eisini ein gáva – eitt vakurt listaprent, annaðhvørt eitt sum Rannvá Holm Mortensen ella Gvøðny Áarstein hevði gjørt. Listaprentini eru samstarv millum Kvinnu, listakvinnurnar og Krabbameinsfelagið. Ein vakur tanki, ein áminning um at standa saman um bróstini, um kvinnurnar, ið raktar verða, og tey, ið standa teimum nær.

Vøkru forsíðuna á heystblaðnum prýddi Finngerð Mikkelsen, sum eisini er sjálvboðin í Krabbameinsfelagnum og sum er ein av teimum trimum kvinnunum, sum fortelur sína søgu um at fáa bróstkrabba.

### Broytingar í dagpeningalógini

Krabbameinsfelagið fegnast um broytingarnar í dagpeningalógini, serliga at nú fáa langtíðarsjúk dagpening í longri tíð.

Í mars mánaði samtykti eitt einmælt Løgting uppskotið um broyting í dagpeningalógini, sum Sólvit E. Nolsø, landsstýrismaður í almannamálum, legði fyri Løgtingið. Broytingarnar hava við sær fleiri batar, sum eru ógvuliga týðandi fyri fólk, sum higartil eru dottin niður ímillum ymsar vælferðarskipanir.

Áðrenn lógin varð broytt, kundi dagpeningur vegna sjúku í mesta lagi verða veittur í 40 vikur, svarandi til umleið níggju mánaðir. Tað er ikki óvanligt, at fólk við krabbameini eru óarbeiðsfør longur enn níggju mánaðir, og hava tá onga inntøku havt, tí rætturin til sjúkradagpening er dottin burtur. Umframt heilsuligu avbjóðingarnar hevur sostatt verið talan um ein fíggjarligan smeit fyri sjúklingin.

Við lógarbroytingini kann dagpeningur veitast í 52 vikur, umframt at dagpeningur í ávísum førum eisini verður veittur longur enn 52 vikur.

Annað er eisini broytt í lógini, m.a. betri treytir hjá smærri vinnurekandi í dagpeningaskipanini, og at tey við útsettari pensjón fáa rætt til dagpening í sambandi við sjúku.

Broytingarnar komu í gildi 1. apríl.

## Innsavning og stuðul

### Grannakaffi 2022

Grannakaffi var í vikuskiftinum 22. til 24. apríl. Grannakaffi er árliga innsavningin hjá Krabbameinsfelagnum, har fólk kunnu gera sína egnu innsavning til frama fyri Krabbameinsfelagið.

„Hvat kann eg gera fyri at hjálpa? Hvussu kann eg gera mun?" Henda spurningin kenna tey flestu og henda spurningin fær Krabbameinsfelagið javnan frá fólki. Hóast tað til tíðir kann tykjast torført at fáa greiði á, hvussu ein best kann veita hjálp, so er einfalda loysnin at hjálpa teimum, sum longu hjálpa.

Til ber at hava Grannakaffi heima, á arbeiðsplássi ella onkra aðra staðni og bjóða grannunum til ein drekkamunn og spyrja um tey vilja lata eitt oyra í bússuna. Ja møguleikarnir eru nógvir. Tað er bara hugflogið, sum gerð av, hvussu innsavningin er.

Í 2022 vóru 19 vertir og inn komu kr. 115.705,45.

## Spyr.fo

Spyr.fo og Krabbameinsfelagið halda fram við samstarvinum á sætta ári. Spyr.fo er spurnartænasta, sum ger skjótar spurnakanningar millum føroyingar á fartelefonini. Fyri hvønn luttakara letur tann, sum ger kanningina, 4 krónur til Krabbameinsfelagið. Higartil hava gott 5000 føroyingar teknað seg til Spyr.fo, og soleiðis útvegað Krabbameinsfelagnum stuðul. Í 2022 var stuðulin 126.272 krónur. Vit takka hjartaliga fyri stuðulin frá Spyr.fo, umframt teirra íkast til at varpa ljós á krabbamein og á tað arbeiðið, sum felagið ger.

## Stuðulstiltak í SALT



Tann 15. oktober var skipað fyri stórum stuðulstiltaki í SALT á Tvøroyri. Rebekka Olsen Kærbech úr Vági skipaði fyri hesum megnar tiltaki. Á skránni var ábit, stuttligt undirhald, góður tónleikur, frásøgn frá arbeiðinum í Krabbameinsfelagnum og Finngerð Mikkelsen, ið sjálv hevur havt krabbamein og er virkin í Bót til bata, segði sína søgu. Eisini var uppboðssøla og listaframsýning, umframt møguleiki at keypa lutaseðlar.

Rebekka Olsen Kærbech handaði Krabbameinsfelagnum stuðulin, sum kom inn fyri tiltakið. Krabbameinsfelagið takkar henni hjartaliga og øllum, sum luttóku, stuðlaðu og á ein hvønn hátt veittu eina hjálpandi hond, soleiðis at kvøldið eydnaðist so væl. Inn komu 146.203 krónur.

## Team Rynkeby Føroyar Grunnurin

Á samkomu í Reinsarínum leygardagin 24. september handaði Trygvi Kallsoy, liðskipari, Krabbameinsfelagnum upphæddina, sum Team Rynkeby Føroyar hevur savnað inn seinasta árið.

Úrslitið gjørdist 1.480.000 krónur. Peningurin verður brúktur til gransking og sum stuðul til familjur við álvarsliga sjúkum børnum. Grunnurin hevur veitt stuðul til tvær granskingarverkætlanir, harav onnur er liðug.

Team Rynkeby Føroyar hevur øll árini havt tætt samstarv við Krabbameinsfelagið. Tey fyrstu árini stuðlaði felagsskapurin børnum við krabbameini, men seinnu árini er grunnurin víðkaður til eisini at fevna um børn við lívshættisligum sjúkum. Fyri at halda rakstrarútreiðslurnar so lágar sum gjørligt, umsitur Krabbameinsfelagið grunnin. Hetta hevur havt við sær gott og økt samstarv millum Krabbameinsfelagið og onnur sjúklingafeløg, so sum Hjartafelagið, Beran og Cystisk fibrosufelagið. Føroysk børn við krabbameini fara til Danmarkar til viðgerðar, og tí fær Børnecancerfonden eisini ein part av stuðlinum.

Berin og Sinnisbati hava eisini fingið stuðul og 250.000 krónur eru tillutaðar hesum bólkum í 2022.

### Stuðul veittur til familjur við álvarsliga sjúkum børnum

Á hvørjum ári savnar Team Rynkeby Føroyar inn pening, so at familjur at børnum við lívshættisligum sjúkum kunnu søkja um stuðul. Í 2022 varð stuðul latin tíggju familjum.

### Jólagávur til børn við álvarsliga sjúkum, sum eru stødd í Danmark á jólum

Á hvørjum ári fáa børn, ið eru álvarsliga sjúk og stødd í Danmark á jólum í sjúkuørindum, eina jólagávu. Gávan er ein peningagáva. Tað vóru trý sjúk børn, ið vóru stødd í Danmark á jólum, ið fingu jólagávur.

### Hjálpigrunnurin hjá Krabbameinsfelagnum

Krabbameinssjúklingar kunnu fáa fíggjarligan stuðul úr Hjálpigrunninum hjá Krabbameinsfelagnum. Stuðul á 3000 krónur kann verða veittur til sjúkligar, sum innanfyri seinastu tvey árini hava verið í viðgerð fyri krabbamein og sum eru búsitandi í Føroyum. Í 2022 fingu 27 fólk stuðul úr Hjálpigrunninum.

## Samskifti við almennar myndugleikar

Krabbameinsfelagið vil vera við til at styrkja krabbameinsøkið í Føroyum og tryggja betri rættindi fyri tey, sum merkja sviðan av krabbameini. Tí er ein týðandi partur av arbeiðinum hjá felagnum, miðvíst at vísa á tørvin á batum og hægri raðfestingum á økinum. Felagið fylgir væl við í tí, sum fer fram á krabbameinsøkinum, og royna vit at gera okkara ávirkan galdandi, har tað er neyðugt. Vit royna at ávirka myndugleikarnar til at bøta um umstøðurnar hjá teimum, sum hava krabbamein og teimum, ið standa teimum nær.

Hetta ger felagið við m.a. at hava samstarvsfundir við viðkomandi myndugleikar, vera virkin hoyringspartur í viðkomandi málum hjá politisku skipanini, gera vart við okkum í miðlunum og skipa fyri tiltøkum. Tað hava vit eisini gjørt í fleiri førum í ár.

### Fundir við Landssjúkrahúsið

**Fundur 11. februar**, har evnini millum annað vóru bróstkrabbaviðgerð, palliativa økið og kontaktpersónur hjá krabbameinssjúklingum.

Landssjúkrahúsið greiddi frá, at bróstkrabbaviðgerðin er við at koma í fasta legu, eftir at samstarv er fingið í lag við Aalborg Sjúkrahús, ið tekur sær av at skurð- og stráluviðgerðini til hesar sjúklingar.

Krabbameinsfelagið hevur javnan gjørt vart við, at neyðugt er at uppraðfesta og menna palliativa økið. Landssjúkrahúsið greiddi frá, at á fíggjarlógini fyri 2021 var peningur játtaður, sum svaraði til eitt fulltíðarstarv. Sjúkrarøktarfrøðingarnir, sum eru í starvi, eru farnir upp í tíð og læknaskrivaraorka er sett at taka sær av tí umsitingarliga. Tað er nógv fokus á hesum í løtuni, umframt at fáa sjúkugongdirnar betur samskipaðar.

Krabbameinsfelagið eftirlýsti og vísti á tørvin, at hvør sjúklingur hevur sín kontaktpersón, ein navngivnan samskipara, sum viðkomandi kann seta seg í samband við og sum kann vera akkersfólk í viðgerðargongdini, eisini ímillum lond og ymsa deildir. Tveir sjúklingaleiðbeinarar eru settir í starv í Sjúkrahúsverkinum. Tey arbeiða meira yvirskipað við at menna sjúklingagongdir og betra mannagongdir.

Fyrr hevur verið avgjørt ikki at screena fyri prostatakrabba við at taka ein blóðroynd og kanna PSA. Krabbameinsfelagið nevndi ein MR-skannara, sum lætt kann staðfesta prostatakrabba. Hetta er ikki tøkni, sum Sjúkrahúsverkið hevur í løtuni, og tá ið talan er um screening, so bíðar Sjúkrahúsverkið eftir nýggju krabbameinsætlanini og eftir hvørjum tilmælum, landsstýrismaðurin fer at taka undir við og raðfesta.

**Fundur 28. mars** um skriv frá tveimum sjúklingum um umstøðurnar, tá ið teir hava ligið á sjúkrahúsinum.

Tað er tíverri sterkur lesnaður, hugleiðingar, sum tveir sjúklingarnir hava skrivað, har teir greiða frá, hvussu umstøðurnar eru. Fýlst verður m.a. á vánaligu fysisku karmarnar, og tað at liggja á gongini, tá ið man er álvarsliga sjúkur og illa fyri. Krabbameinsfelagið bjóðaði tí leiðsluni á Landssjúkrahúsinum á fund, har vit lósu hugleiðingarnar upp fyri teimum. Landssjúkrahúsið helt, at her vóru viðurskifti, sum tey kunnu gera nakað við beinanvegin.

### Fundir við Heilsumálaráðið

#### Fundur 7. mars um koppseting í framtíðini

Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur gjørt av at fara undir arbeiðið at gera eitt uppskot um, hvussu koppsetingarøkið kann skipast í framtíðini. Talan er bæði um vanligu koppsetingarnar og hópkoppsetingar. Landsstýrismaðurin setti tann 11. februar í 2022 ein verkætlanarbólk, sum skal orða uppskotið. Á fundinum greiddi Heilsumálaráðið frá um ætlanina hjá landsstýrismanninum. Ymisku feløgini, og eisini Krabbameinsfelagið, søgdu frá sínum hugsanum, um hvussu tilboðini um ávikavist koppseting og hópkoppseting kunnu skipast í framtíðini. Endamálið er at fáa fleiri at taka av tilboðnum.

#### Fundur 18. oktober um endurmenning

18. oktober var Krabbameinsfelagið á fundi við Heilsumálaráðið um endurmenning. Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur sett ein arbeiðsbólk, sum er mannaður við umboðum frá Almannamálaráðnum, Heilsumálaráðnum og Kommunufelagnum at hyggja at, um endurmenning í Føroyum virkar sum ein samanhangandi tvørfaklig skipan, har rættindi og skyldur hjá fólki eru tryggjað, so at tey aftur kunnu fara at virka í gerandisdegnum. Í hesum sambandi heitti Heilsumálaráðið á Krabbameinsfelagið um at hjálpa teimum at lýsa endurvenjing í Føroyum út frá sjónarhorninum hjá teimum, sum venda sær til Krabbameinsfelagið.

## Evropeiskt og norðurlendskt samstarv

Krabbameinsfelagið er limur í bæði evropeiskum og norðurlendskum samstørvum. Tað evropeiska krabbameinssamtakið eitur Association of European Canacer Leagues, stytt ECL, og tað norðurlendska eitur Nordic Cancer Union, stytt NCU.

Vanliga møtast feløgini til samstarvsfundir nakrar ferðir árliga at umrøða og samstarva um týðandi mál, sum hava við krabbamein, viðgerð, røkt og gransking at gera.

NCU veitir eisini fíggjarligan stuðul til verkætlanir, ið stimbra samstarv í at granska í krabbameini í norðurlendsku londunum. Ein treyt er, at verkætlanin fevnir um granskarar úr tveimum ella fleiri norðurlendskum londum.

# Hagtøl

## Støðan í Føroyum

Talið av krabbameinstilburðum økist í hvørjum, men sama øking er ikki, tá ið hugt verður at, hvussu nógv doyggja. Tað talið hevur mest sum verið tað sama seinastu árini. Fólkatalið veksur eisini, og tá ið hædd verður tikin fyri tí, so hava tilburðirnir hjá monnum verið rættiliga støðugir, men tilburðirnir hjá kvinnum eru øktir nakað. Tó fáa fleiri menn enn kvinnur staðfest krabbamein, og fleiri menn enn kvinnur doyggja av krabbameini.




| | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tilburðir krabbamein | 195 | 187 | 226 | 249 | 220 | 231 | 242 | 207 | 263 | 234 | 273 | 261 | 236 |
| Deyðsføll krabbamein | 88 | 103 | 96 | 100 | 127 | 97 | 98 | 95 | 101 | 103 | 122 | 103 | 102 |

## Samanbering við hini Norðurlondini

Tá ið samanborið verður við hini Norðurlondini, skal leggjast til merkis, at tølini taka hædd fyri broyting í fólkatølunum í londunum yvir tíð. Bæði hjá kvinnum og monnum eru tilburðirnir lutfalsliga færri í Føroyum enn í hinum Norðurlondunum. Hinvegin eru deyðsføllini ikki færri.




| | 1970-1979 | 1980-1989 | 1990-1999 | 2000-2009 | 2010-2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| DK | 34 | 35 | 42 | 56 | 68 |
| FØ | 25 | 33 | 37 | 51 | 65 |
| FI | 28 | 38 | 50 | 64 | 68 |
| ÍS | 37 | 47 | 55 | 66 | 69 |
| NO | 37 | 44 | 53 | 64 | 74 |
| SV | 39 | 48 | 57 | 69 | 76 |




| | 1970-1979 | 1980-1989 | 1990-1999 | 2000-2009 | 2010-2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| DK | 44 | 46 | 52 | 60 | 71 |
| FØ | 36 | 43 | 46 | 52 | 64 |
| FI | 42 | 51 | 59 | 66 | 71 |
| ÍS | 47 | 53 | 56 | 65 | 70 |
| NO | 46 | 52 | 58 | 65 | 73 |
| SV | 48 | 55 | 61 | 67 | 74 |

*Kelda: NORDCAN*